**Føroya Arbeiðsgevarafelag**

**Fíggjarmálaráðið**
**Postboks 2039**
**FO-165 Argir**

Tórshavn 21. oktober 2019

Okkara tilv./Our ref.
6650-203/Mortan/Fxggja-FK-Br-V
Tykkara tilv./Your ref.

## Viðmerkingar til lógaruppskot um skattafrádrátt á 50.000 kr. til lærlingar

Vinnuhúsið hevur fingið til viðmerkingar frá Fíggjarmálaráðnum lógaruppskot um at veita lærlingum ein árligan frádrátt í skattskyldugu inntøkuni á 50.000 kr.

Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Handverksmeistarafelag, Føroya Prentsmiðjufelag, umframt Handilsvinnufelagið, Ferðavinnufelagið og KT-felgið, sum eru vinnugreinafeløg, ið varða av lærlingum, taka væl ímóti uppskotinum.

Uppskotið veitir ein lætta í vanliga lønarskattinum hjá teimum lægri inntøkunum og eggjar samstundis lærlingum til at arbeiða meira við síðuna av læruni. Hetta er ein vinningur fyri bæði arbeiðsgevaran og arbeiðstakaran, sum í hesum førinum er lærlingurin.

Arbeiðsgevarin fær atgongd til meira arbeiðsmegi, og lærlingurin fær møguleika fyri at vinna nakrar eyka krónur. Harumframt fær lærlingurin ein eyka vinning burtur úr læruni, sum hann fær burtur úr arbeiðinum við síðuna av vanligu lærutíðini.

Uppskotið kann somuleiðis eggja fólki í at fara í læru, og tað samsvarar við heimsmálini há ST. Víst verður til mál 4 um dygdargóða útbúgving úr teimum 17 heimsmálunum hjá ST.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur fleiri ferðir víst á, at vanligi lønarskatturin í Føroyum er ov høgur, og Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur tí undir við hesum uppskotinum um ein lætta í vanliga lønarskattinum hjá lærlingum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur tó fast við síni tilmæli um, at land og kommunur eiga at seta seg saman at gera eina langtíðarætlan fyri alla tí føroysku skatta- og avgjaldsskipanina, har langtíðarmálið er at lækka vanliga lønarskattin yvirhøvur. Hetta skal fíggjast við at strika serskipanir og frádráttir, samstundis sum fleiri brúkara- og tænastugjøld koma inn í myndina.

Ein verulig skattanýskipan má fremjast yvir eitt longri áramál í tøttum samstarvi millum land og kommunur.

**Vinarliga**

Føroya Arbeiðsgevarafelag

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo